# ítróttur

Nr. 73 • týsdagur • 19. apríl 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo




## Dreyma-finalan verður veruleiki

síða 25

# Støkk tók tað nógva

**FM-kapping í liðfimleiki var á skránni um vikuskiftið. Støkk gjørdist mest vinnandi felagið, men serliga í dreingjarøðini tykist Havnar Fimleikafelag næstan einsamalt**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk*



Yngru fimleikararnir skuldu um vikuskiftið royna seg í liðkappingini, tá FM stóð á skránni í Runavík.

Kappingin skuldi eftir ætlan fevna um átta bólkar – fýra hjá gentum og dreingjum – men í einum dreingjabólki bar ikki til at tekna nakað lið til kappingina.

Sum heild tykist eisini nakað tunnligt við liðum í dreingjarøðini. Soleiðis hevði Havnnr Fimleikafelag ongan at kappast við í tveimum av sínum kappingum, og tó at fimleikararnir sjálvandi gera sítt besta kortini, so verður kappingin ikki heilt tað sama uttan kapping…

Hjá gentunum var tó talan um fleiri lið í øllum bólkunum. Her eydnaðist Støkk at vinna tríggjar av fýra bólkum, meðan Havnar Fimleikafelag fór avstað við sigrinum í bólki 2.

Úrslitini av kappingini vórðu ananrs hesi:

### Gentur

**Bólkur 1**

| | |
|---|---|
| Støkk, A | 56,370 |
| Havnar Fimleikaf. | 56,125 |
| Støkk, B | 48,550 |

**Bólkur 2**

| | |
|---|---|
| Havnar Fimleikaf. | 57,900 |
| Ljósið | 55,995 |
| Støkk | 54,750 |

**Bólkur 3**

| | |
|---|---|
| Støkk | 72,830 |
| Ljósið, 3X | 67,590 |
| Havnar Fimleikaf. | 60,230 |
| Ljósið, 3Y | 58,860 |

**Bólkur 4**

| | |
|---|---|
| Støkk | 68,780 |
| Havnar Fimleikaf. | 61,650 |

### Dreingir

**Bólkur 1**

| | |
|---|---|
| Støkk | 52,575 |
| Havnar Fimleikaf. | 41,800 |

**Bólkur 2**

| | |
|---|---|
| Havnar Fimleikaf. | 57,675 |

**Bólkur 4**

| | |
|---|---|
| Havnar Fimleikaf. | 62,516 |

# Landsliðini úttikin

**Landsliðini, ið skulu umboða Føroyar í Norðurlanda Kappingini (NM), sum verður leikt í Danmark í juli mánað, eru nú úttikin**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Innan bridge eru norðanlond í heimsflokkið. Tað eru ikki nógvar kappingar, sum eru sterkari enn NM. Hetta setur sjálvsagt stór krøv til okkum, um vit ikki skulu vera kanónføði.

Føroyar hevur verið við til NM síðani 1984 og sigast má, at tað hevur gingið framá, serliga tey síðstu 10 árini hevur framgongdin verið stór. Hetta varð prógva, tá ið vit á heimabana, sum var á Hotel Hafnia í Havn, høvdu eina framúr kapping og gjørdist nummar fimm og seks londum.Hetta var fyrstu fer, at Føroyar ikki endaði aftast. Um kappingin hevði verið skipað soleiðis, at ein fekk tvey stig fyri at vinna ein dyst, hevði Føroyar enda sum nummar tvey.

Liðið, ið skal umboða Føroyar í opnu kappingini er ein blandingur av einum royndum parið, sum hava drúgvar altjóða royndir og einum parið, sum ikki hevur altjóða royndir, men, ið her heima hevur verið eitt tað besta parið í nøkur ár.

Damulandsliðið er mynda av nøkrum sera royndum leikarum, ið allar áður hava umboða føroyar í NM. Tó er ein nýggj par samanseting á liðinum, Maria Christiansen og Randi Jacobsen. Tær hava ikki spælt bridge saman leingi og tískil verður tað sera spennandi, hvussu tær fara at klára seg í tí beinhørðu kappingini.

**Føroysku liðini**

**Opin kapping**
Magni Jøkladal og Allan Dal- Christiansen
Jóannes Mouritsen og Heðin Mouritsen
Bogi Simonsen er leikandi liðskipari

**Kvinnur**
Marjun Restorff og Arnleyg Mikkelsen
Randi Jacobsen og Maria Christiansen
Marner Joensen er liðskipari

## Tríggir minuttir í Klaksvík

Dysturin millum KÍ og Skála, sum eftir skuldi spælast sunnudagin, varð avblástur eftir bert trimum minuttum. Lágættin bar við sær, at kringstøðurnar um Djúpimýru nærum vóru orkan-líkar, og tí avgjørdi dómarin eftir lítlari løtu at blása dystin av.

Hóast teir soleiðis ikki fingu víst síni kynstur soleiðis rættiliga, so kunnu klaksvíkingarnir fegnast um, at vikuskiftið kortini flutti teir upp á oddasessin í landskappingini. Her var ÍF statt undan sunnudagin, men tá teir taptu, fingu teir samstundis verri málmun enn KÍ, sum altso gjørdist nýtt oddalið uttan at spæla.

FSF tók mánadagin avgerð um, at dysturin ístaðin verður leiktur týskvøldið.

-jm








## So tapti ÍF

síða 22



Horsens og Byrial:

## Ikki tapt í 17 dystir

síða 28